ítróttur

Nr. 216 • hósdagur • 13. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Ábreiðslu og bót

Sum vit skrivaðu í farnu viku, so kærdi Sóljan StÍF, fyri at tær í dystinum millum liðini ikki høvdu skrivað ein av málverjunum á dómaraseðilin fyri dystin.

Hondbóltssambandið hevur nú tikið støðu í málinum, og varð úrslitið, at StÍF fær eina ábreiðslu fyri hetta saman við eini bót upp á 500 kr.

-jm

Stjørnan-Neistin 24-23 (14-13):

Gestirnir tóku ikki av

Neistakvinnurnar iðraðu seg eftir dystin í Klaksvík, har tær móti dystarenda kroystu heimaliðið heilt nógv, uttan at tær tó fingu nakað afturfyri

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Neistin er í fyrstu atløgu ikki longur partur av oddastríðnum í bestu kvinnudeildini. Hetta má vera niðurstøðan eftir týskvøldið, tá bláu havnarkvinnurnar máttu fara heim við ongum úr Klaksvíkini.

Katarina Stepanovic tykist koma alsamt betri fyri seg, og týskvøldið var hon høvuðsálitið í álopsspælinum hjá Stjørnuni

Mynd: SáH

Breiddin mundi kostað

Tað var tó ikki uttan mótstøðu, at Stjørnan fekk stigini. So langt ífrá. Fyrstu løtuna var annars ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um serliga spennandi dyst, men eftir at Neistin efitr einum korteri hevði fingið skil á verjuspælið hjá sær, fekk heimaliðið ein heilt skarpan gang.

Kanska var tað eisini tað, at Neistin hevur ein hóp, sum er væl breiðari enn hjá flestu mótstøðuliðunum. Hetta var sjónligt í Vestmanna fyri stuttum, har Neistin móti dystarenda var um at stjala stig, tá VÍF fór at meðast, og soleiðis var eisini hesaferð.

Seinastu løtuna undan steðginum tók Neistin – og serliga Lina Andriulyte – dik á. Fimm mál á – harav fýra frá Linu – sendu Neistan eitt mál framum, og so var spenningurin av álvara komin í aftur dystin.

Spenningurin í topp

Stjørnan megnaði tó at svara aftur. Tær togaðu seg eitt vet framum undan steðginum, og fyrstu løtuna eftir hendan lupu tær aftur avstað. Hesaferð varð tjóðurið frá mótstøðuni tó ikki eins langt, og skjótt tók Neistin at toga aftur.

Og so gekk tað heilt javnt á seinastu 20 minuttirnar. Liðini bæði skiftust um at skora, samstundis sum heimaáskoðararnir skiftandi heppaðu liðið hjá sær og skiftandi bitu negl. Og allar seinastu løtuna hevði Neistin so allar møguleikar at avgera.

Við tveimum minuttum eftir og einum máli á odda fekk Stjørnan eina útvísing. Tær megnaðu tó at økja um munin, men tá næsta útvísingin rakti lítla løtu seinni, stóð av álvara á. Neistin hevði við góðum minutti eftir møguleika at minka munin í eitt mál, men tær misnýttu álopsroyndina, og so kundi Stjørnan royna at koyra tíðina út. Neistin fekk tó minkað munin einaferð, men hetta var ikki nóg mikið. Tað var Stjørnan, sum fekk loyvi at fegnast um stigini, og gestirnir kundu so bara drýpa høvur og hugsa um, hvat kundi verið.

Og í øllum førum kann staðfestast, at tvey stig her høvdu havt við sær, at Neistin framvegis hevði verið væl við í oddastríðnum. Har eru tær tó hektaðar nakað av nú, og spurningurin er so, hvørt tær kunnu vinna nakað av tí mista aftur, tá StÍF vitjar komandi vikuskifti. Stjørnan skal tá á vitjan á Giljanesi, og mett eftir fyrra dystinum móti Søljuni er lítið at ivast í, at talan her verður um tvey trygg stig.

Dysturin í tølum

Stjørnan-Neistin 24-23 (14-13)
Málskjúttar
Stjørnan: Katarina Stepanovic 8(4), Annika Ljósstein 5(2), Joan M. Djordjevic 5, Bára S. Klakstein 4, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1
Neistin: Simona Dziugyte 9, Lina Andriulyte 7, Ása á Neystabø 2, Rakul Augustinussen 2, Lív Sørensen 2, Jórun Ludvig 1
Brotskøst: Stjørnan 10
Útvísingar: Stjørnan 2, Neistin 3
Dómarar úr Kyndli: Geir Wardum & Gunnar Gregoriusen

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	5	-	0	-	1	154	127	27	10
2 Stjørnan	6	4	-	1	-	1	155	118	37	9
3 VB	6	4	-	0	-	2	144	112	32	8
4 StÍF	5	3	-	1	-	1	119	112	7	7
5 Neistin	5	2	-	0	-	3	134	112	22	4
6 Søljan	5	0	-	0	-	5	86	138	-52	0
7 Kyndil	5	0	-	0	-	5	68	141	-73	0

Bulurin hjá B68 verður tann sami

Einastu spælararnir, sum eru farnir aðra staðni, eru Dánial Hansen og Jann Ingi Petersen, og á Toftum verður arbeitt við at fáa aðrar í teirra stað

B68
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað skal ivaleyst nógv til, áðrenn B68 formaðurin, Niclas Davidsen, missir fatningin, sum tað plagar at verða tikið til. Hann plagar at vita um tað, sum hann tekst við, og hann plagar at vita, hvat rørir seg kring hann. Men í fyrrakvøldið var hann ovfarin, tá ið tað eina løtu varð spurt og fregnast nógv eftir, um nú tveir av stuðulsspælarunum á bronsulinum hjá B68 í summar vóru á veg í íslendskan fótbólt.

– Eg velji at halda meg til tað, sum vit hava tosað við spælararnar um, og tær avtalur, sum vit hava við teir, heldur enn at lurta eftir óváttaðum leysasøgum í bløðunum, staðfestir Niclas Davidsen, tá ið vit fregnast eftir, hvussu útlitini fyri komandi kappingarári eru.

B68-formaðurin sigur seg einki kenna til, at nakar av stuðulsleikarunum skal úr felagnum í næstum

Tað er greitt, at Petur Mohr aftur næsta ár fer at hava ábyrgdina av besta liðnum. Tað er eisini greitt, at Albert Sævarsson, sum varð kosin besti málverjin í føroysku kappingini í ár, aftur næsta ár fer at standa ímillum stólparnar á Svangaskarði.

Dánial Hansen er farin aftur til NSÍ. Tað er ikki komið heilt óvæntað á B68. Jann Ingi Petersen er farin til Fremad Amager. Tað hava teir vitað leingi á Toftum. Hans Fróði Hansen er sáttmálabundin at Tofta Ítróttarfelag næsta ár. Talan er um sáttmála, sum er góðkendur av sáttmálanevndini hjá FSF. Tað vil við øðrum orðum siga, at um Hans Fróði næsta kappingarár skal umboða annað felag enn B68, so skal avtala gerast um hetta millum B68 og møguliga nýggja felagið. Sambært B68 formannin hevur ikki eitt kis verið at hoyrt frá nøkrum felag, og á Toftum siga teir seg ongar ætlanir hava um at sleppa sær av við Hans Fróða.

– Vit hava verið fegnir um at hava Hans Fróða í felagnum hjá okkum. Tað man vera óneyðugt at siga, at hann hevur roynst okkum væl. Okkara fatan er, at Hans Fróði rættuliga er partur av okkara liði, og vit hava onga orsøk at halda, at hann ikki fer at halda seg til avtaluna, sum vit hava okkara millum, sigur Niclas Davidsen.

Í fjør vóru tað fleiri, sum mettu, at B68 hevði kanska bestu breiddina millum teir fyrstu ellivu, men at teir viknaðu skjótt, tá ið onkrir av teimum bestu vóru burturi frá, tí teir vóru skaddir ella leikbannaðir.

– Bulurin á liðnum verður tann, sum hann var síðsta kappingarár. Tað er harvið eisini greitt, at Fróði Benjaminsen fer at spæla við B68. Fróði er ein fínur spælari, og tað fer honum neyvan at bera til at siga nei til tilboð uttanlands frá, um talan verður um stórar peningaupphæddir. Men fyribils er tað einki, sum bendir á, at hann fer at spæla aðra staðni enn hjá okkum, veit Niclas Davidsen at siga.

B68 formaðurin leggur afturat, at tað í felagnum verður arbeitt við at fáa fleiri spælarar á liðið. Talan er um onkrar føroyskar spælarar og onkrar spælarar aðra staðni frá.

– Í fjør vóru vit serliga fegnir um, at tað royndist væl hjá fleiri av ungu spælarunum, sum eru uppvandir í felagnum hjá okkum. Hesir verða nú eitt ár eldri, teir hava royndirnar av at spæla í bestu deildini, og vit vóna, at onkur ungur spælari afturat fer at bjóða seg fram í kappingini um plássini, sigur Niclas Davidsen, sum ikki tykist rokna við, at liðið hjá B68 fer at hava verri fyritreytir, enn tað hevði síðsta kappingarár.

Allan á odda

Liðið hjá Allani Dal-Christiansen er longu nú um at toga seg leyst í FM-stríðnum

BRIDGE
Bogi Simonsen

Komandi vikuskifti verða trý umfør í FM-liðkappingini fyri 1. og 2. deild leikt. Spælt verður í handilsskúlanum á Kambsdali, og byrjað verður kl 19:30 fríggjakvøldið.

Spenningurin í 1. deild undan komandi vikuskifti er ikki tann stóri, hetta tí at liðið hjá Allan Dal-Christiansen hevur lagt seg væl á odda. Liðið hjá Boga Simonsen má taka annað skinn um bak, skulu teir geva oddaliðnum nakra mótstøðu.

Liðið hjá Allan Dal Christiansen, umframt Allan sjálvan:
Magni Jøkladal
Jóannes Mouritsen
Heðin Mouritsen
Dánjal Pauli Mohr
Per Kallsberg

Støðan í 1.deild

	1	2	3	4	5	6	Sum
1 Allan Dal-Christiansen			21		23	25	69
2 Bogi Simonsen				13	20	16	49
3 Dia Jacobsen	9			15		12	36
4 Jóna Grunnveit		17	15		9		41
5 Jórun Johannesen	7	10		21			38
6 HH Bókhald	2	14	18				34

Kappingin í 2.deild er sera spennandi og jøvn, nærum øll liðini hava møguleika fyri at vinna deildina, tó kann væntast, at kappingin kemur at standa millum tey trý liðini,ið longu nú hava lagt seg á odda. Liðið hjá Óla Holm er komið best frá byrjan, og kunna teir aftur fáa eitt lið úr suðuri í bestu deildina.

Støðan í 2.deild

	1	2	3	4	5	6	7	8	Sum
1 Hallur Ellingsgaard	18							25	56
2 Danny Danielsen	0						23	1	24
3 Gunnar Mouritsen	17					22	13		52
4 Marita Krosstein					9	14	8		31
5 Oli Holm			21			18		18	57
6 Raimund Langgaard		8	16	12					36
7 Eydun S. Olsen		7	17	22					46
8 Sámal P.Johannesen	0	25			12				37

Landsliðsvenjing

Venjingin til EM, sum verður á Malmø í summar er nú av álvara farin í gongd. Tað er ein av okkara royndu leikarum Rói á Rógvu Joensen, sum er venjari. Bruttu hópurin til liðið sær soleiðis út:
Bogi Simonsen — Símin Lassaberg
Heðin Mouritsen — Jóannes Mouritsen
Per Kallsberg — Dánjal Pauli Mohr
Arne Mikkelsen — Pól Egholm

Teri báðu síðstnevndu eru lesandi í Danmark, men góðu samskiftismøguleikarnir, ið ein hevur um alnetið, hava gjørt tað gjørligt hjá teimum báðum at verða við í bruttu hópinum. Liðið, sum kemur at umboða Føroyar verður úttikið um 1.mars 2004.

Hetta spælið er frá einum landsliðsvenjingardysti. Eg/Tú situr Eystan og hevur hesa hondina, allir í hætti:

Sp B
Hj -
Rú K8752
Kl KDB8765

Norðan opnar við 1sp, hvat meldar tú?

Eg haldi at besta melið er 5kl, men tað eru tað helst fleiri, sum eru ósamd við mær í. Sunnan doblar fyri at vísa, at hann hevur góð kort. Norðan kennur seg nú kroystan við hesari hondini:

Sp EK109876
Hj 987
Rú ED9
Kl -

Norðan valdi at melda 6kl, ið vísir renonce í kleyvara og biðir makkarin velja millum rút og hjart. Suður valdi at melda 6 hj, sum vestan doblaði.

Hetta var ikki júst tað, ið sunnan hevði hugsað sær, tá ið hann doblaði 5 kl, tí hann sat við:

Sp -
Hj KB54
Rú B42
Kl E109742

Tá ið roykurin hevði lagt seg fekk suður 6 stikk í 6 hjÐ til 1700 út.

Við hitt borðið spældi eystan 3klD og fekk 6 stikk og 800 út. Ein dubultdekkari uppá 2500!!

FM-Blandapør

Leygardagin 22.nov verður skipað fyri árligu FM kappingini í Bridge fyri blandað pør. Spælt verður í Bridgehúsinum í Havn og byrjað verður kl:14:00. Tilmelding hjá Róa á Rógvu Joensen á 319419 ella í Bridgehúsinum í Havn.